# Góðu politikarar, vinnulívsfólk og ikki minst fólkið í Føroyum

PAUL CLELLAND

SM Lerwick 5760

Eg loyvi mær at skriva eitt opið brævnú eg eri vorðin sera vónsvikin og tikin á bóli orsakað av nýligani avkutaða ferðasambandinum millum Føroyar og Skotland.

Eg havi verið og vitja í Føroyum tríggjar ferðir síðani 2004, tí eg havi ein føroyskan vin, ið eg hitti á universiteti í Skotlandi í 1990 árunum. Hvørja ferð hava kona mín og eg kent okkum sera vælkomin hjá vinum okkara og teirra familjum og yvirhøvur av fólki, vit hava hitt ymsastaðni á oyggjunum. Føroyar eru veruliga ein av ókendu skattunum í Europu og í heiminum yvirhøvur, og vit hava verið óalmennir seljarar av ferðum til Føroyar síðani.

Eg veit ikki hvat flestu føroyingar halda er besti mátin at menna føroyska ferðavinnu, men eg eri vísur í, at í løtuni eru oyggjarnar av best goymdu loynidómum í Europu. Eingin ivi er um stórar møguleikar og potentiali, men tørvur er veruliga á framhaldandi og miðvísari marknaðarføring fyri at fáa fatur á stóra potentialinum í Stórabretlandi. Veruligt knýti og menning av sambandinum kann einans henda um eitt fast ferðasamband, sjóvegis og loftvegis, er veruleiki.

Kona mín og eg fluttu til Hetlands í mai í fjør í sambandi við at eg skuldi reka nýggja Tesco supermarknaðin, ið just var verksettur/stovnsettur har. Tesco, ið er triðstørsta handilsketa í heiminum, keypti handlar í Hetlandi, Orkney og Hebridunum í mai 2008. Hetland hevur dagligt ferju samband við Aberdeen, sum liggur 215 fjórðingar sunnanfyri á skotsku strondini. Hetta sambandið verður brúkt nógv, og er ein avgerðandi æðr til Stórabretland, búskaparliga og sosialt. Hetland hevur eina framsókna og eldhugaða politiska leiðslu, ið á virknan hátt roynir at menna búskapin og yvirhøvur støðuna hjá íbúgvunum á oyggjunum. Hetlendingar, ið yvirhøvur mugu roknast fyri at vera millum tey mest tilvitaðu í Bretlandi á umhvørvis- og heilsuøkinum, eru glað fyri at hava fingið ein modernaðan handil við dagligum veitingum av fírskum matvørum frá meginlandinum.

Hetland hevur avgerandi tørv á sambandinum við meginlandið, soleiðis at fólk kunnu vitja, knýta bond og koma aftur til oyggjarnar. Hetta hevur víst seg at vera støðan, mong, ið vitja vísa seg at gerast javnir gestir í Hetlandi. Tað er serliga við hesum í huga at eg eri vónsvikin av manglandi regluligum sambandi millum Føroyar, Hetland og Skotland.

Føroyska sambandið við Danmark er bæði politisk og søguligt, men hóast hetta eru nógvar góðar orsøkir til at styrkja sambandið við Skotland og harvið restina av Stórabretlandi. Tað kann ikki vera skilagott ikki at vera regluliga knýtt at einum búskapi við 60 mió íbúgvum, ið liggur so tætt við? Eg vildi hildið at opnar hurðar til umheimin sum heild yvirhøvur mátti verið ein sera strategiskt týdningamikil málsetningur fyri Føroyar. Opið samband er fortreyt fyri menning av landin og tjóð yvirhøvur. Soleiðis sum eg síggi tað, er høvuðsavbjóðingin at síggja fast samband sum ein møguleika, heldur enn eina óynskta útreiðslu.

**Orsøkirnar og møguleikarnir eru fleiri, t.d.:**

- Atgongd til Mið- og Suðurevropa gjøgnum Stórabretland.
- Atgongd til hægri útbúgving.
- Atgongd til størri marknaðir við vørum og tænastum, bæði í Stórabretlandi og restina av Eiropu, bæði við keypi og sølu í huga.
- Atgongd til undirhald bæði innan ítrótt, mentan og ferðavinnu osfr.

Tað er av týdningi at gera sær greitt, at tað tekur tíð at menna hetta sambandið. Í løtuni er tilvitanin um Føroyar lítil í Bretlandi og eg vildi hildið, at tilvitanin í Føroyum um vinnumøguleikar í Bretlandi er avmarkað. Yvirhøvur er neyðugt við munandi og framhaldandi marknaðarføring, politiskum samstarvi, knýti av sosialum bondum og mentanum, men ein fortreyt má vera, at eitt fast ferðasamband verður stovnsett og hildið.

Eitt týdningamikið mál hjá politikarum og teimum, ið leggja ætlanir, er at umhugsa er ferðasambandið. Nú tá Føroyar eru so smáar, er tað tá rætt fyrst og fremst at hugsa um rakstraravkast og vinningsbýti ella eiga sosiobúskaparligir fyrimunir upp á longri sikt ikki at vera fremsta raðfesting? Í størri londum eru altíð fleiri aktørar, ið kappast um at reka ferðasamband, soleiðis er ikki í Føroyum. Tað er neyðugt at hugsa um møguleikarnar at stimbra aðrar partar av búskapinum og at síggja ferðasamband sum ein stimbrandi møguleika, heldur enn ein kostnað, ið landið ikki hevur ráð til.

Spurningurin er um møguleikar ikki eru fyri samstarvsskipanum millum Hetland, Ísland og Føroyar og møguliga eisini vesturstrondina í Noregi? Hesi øki hava eisini tørv á ferðasambandi.

Eg skilji á lagnum at flogførini ferðast fullsett til Keypmannahavnar dagliga, meðan tað sjáldan er fullsett tá flogið verður til London. Hetta er ein góð ábending um sosiala og søguliga sambandið við Danmark. Man tað vera skeivt at siga at Føroyar síggja umheimin umvegis Danmark í breiðari merking? Tað eigur heilt víst at gagna Føroyum upp á longri sigt, at víðka sjónarringin.

Seinast eg var í Føroyum, segði ein føroyskur fótbóltsáskoðari við meg, at vit eru brøður, so tit kunnu ímynda tykkum, at eg eri vónsvikin, nú eg eri nærri enn nakrantíð við mínar føroysku vinir fyri norðan, men samstundis longri burtur enn nakrantíð.

Eg eri vísur í at ein nógv størri eftirspurningur mennist við tíðini um lagt verður til brots við munadyggari marknaðarføring og realistiskum ferðakostnaðum hjá teimum ferðandi. Við tíðini eigur marknaðurin at mennast soleiðis at rakstrarverdugar ferðalinjur kunnu vera riknar bæði á ferðafólka- og farmaøkinum til gagns fyri framtíðar flutningsveitarar.

# Hugleiðingar um lívið

RICHARD DANIELSEN



Nú hevur man livað eitt langt lív, og eitt sindur hevur lívið lært ein. Tíðirnar í dag eru ógvuliga nógv broyttar frá tí tíðini, tá ið eg var smádrongur og ungur. Tær eru broyttar í allar mátar. Til dømis tann stóra broytingin frá slupptíðini til tann nýmótans fiskiflotan, vit hava í dag og tað, sum tað hevur ført við sær. Eisini er teknologiin ekspanderað ómetaliga, og við hesum er so mangt broytt.

Summar broytingar hava bara góðar avleiðingar við sær, kann man nokk siga, t. d. tann við fiskiflotanum. Aðrar broytingar hava baði góðar og ringar fylgjur. Knívurin var ein góð uppfinning, nær ið nú hann var uppfunnin, men hvussu hevur hann ikki verið brúktur eisini til tað ringa.

Eitt sum er ómetaliga nógv broytt í mínari tíð, er hvat ið sømir seg. Fyrr vóru mørk. Hesi mørk, hildu okkum øllum innanfyri nakrar rammur, sum vóru skilagóðar. Hesi mørk ella lógir vóru bygdar á tær heilagu skriftirnar, og tryggjaðu okkum at skil var á tingunum, so at óskil ikki valdaði.

Hetta er broytt nú. Tað eru nærsagt eingi mørk fyri, hvat okkara tíðindabløð loyva at koma á teirra síður. Kringvarpið, serliga sjónvarpið hevur gingið á odda við at vísa fram alment, tað sum ósømiligt er nú í mong ár. Onkur sigur kanska, at tað kann gera tað sama, tí teknologiin hevur gjørt tað møguligt, at fólk kunnu bara fara inn á netverkið, so hava tey møguleika fyri at síggja alt tað, sum er at síggja. Hatta er kanska rætt fyri ein part, men sjónvarpið var tað sum byrjaði hetta óskilið, langt áðrenn internetið kom. Tað var ikki roynt at nýta "knívin" bert til tað góða, men allur útlenskur lortur hevur verið sendur inn í stovur okkara til óbótaligan skaða fyri okkara ungu.

Summi verja hetta við at siga, at hetta er lívið. Men hugsa tær til, um vit í øllum lutum, sum hava við lívið at gera, hugsaðu so. Um vit gjørdu ting, sum annars eru náttúrlig og fult lóglig, ja neyðug, men gjørdu tað alment, so hevði løgreglan fyri tað fyrsta skjótt komið eftir okkum, og øll sum kenna okkum høvdu hildið, at vit ikki vóru rættsiktað longur, men gingin frá vitinum.

Men tá ið tað kemur til filmsheimin, er alt loyviligt halda hesi, sum bryggja hetta saman, og tey sum metta girndir sínar við tí uttan at hugsa um, at hendan síðspillan er drepandi fyri ættarliðið, sum veksur upp. Nei vit kunnu ikki verja okkara skeivu gerðir við slíkum. Sumt er, sum ikki er sømuligt. Men, sum eg longu havi nevnt, gomlu góðu mørkini eru niður traðkað av girndum menniskjans eftir tí, sum spennandi er fyri hetta av náttúruni spilta hold okkara. Girndin at tjena pening hevur gjørt, at menniskju finna uppá alt skitt fyri at hava eina spennandi søgu ella film, sum selur. At tað brýtur niður tað, sum gott er og koyrir onnur menniskju út í óføri, verður ikki spurt um.

Tað ringasta er tað, at menniskju trúgva, at tey eru á beinari leið, tí vit liva í ein "kristnum landi" . Tey halda at tey eru gudsbørn. Vit trúgva jú á sama Gud, verður sagt, men ansa tær hvat tað er, tú trýrt, eru syndirnar ikki reinsaðar burtur við blóði Jesusar, og ein nýggj lívsførsla byrjað, so ert tú illa staddur. Tú kemur ikki inn í Himmalin við tíni synd, tað er ómøguligt.

Men aftur til tað, sum eg hugleiddi um viðvíkjandi tíðini. Eftir sum tær heilagu skriftirnar siga okkum, skulu vit ikki vænta nakað gott av hesum heimi. Hann liggur í tí illa, stendur skrivað. Syndin hevur valdað, alt síðan menniskjan fall fyrstu ferð. Og øll eru vit fallin, eingin av okkum kann siga seg reinan, tað vita vit. Men vit síggja út av orði Guds, at tá ið menniskja fer at forsvara tað, sum er skeivt og alment stíga fram og fara út um øll mørk, tá er tað serliga vandamikið og hóttafall er. Skriftin kallar tað at fylla syndamálið. 1. Mós. 15,16. Avleiðingarnar av hesum síggja vit í fleiri støðum í skriftunum, t.d. eru Sodoma og Gomorra vælkendir fyri hetta. Jesus nevnir hetta, tá ið hann talar um endatíðina, Luk. 17,28, og sigur at, sum tað var tá, soleiðis skal tað vera tá ið hann opinberast.

Sostatt liva vit í seinastu tíðum. Jesus talar um tað, sum skal henda, og líknar tað við føðingarverkir. Tað er profeterað av Jesusi sjálvum, at hesar tíðir skuldu koma. Ein av verkjunum, sum hann nevnir, er jarðsjálvtar, tað er nakað, sum vit hoyra um til dagligt. Vit vita, at tá ið verkir koma á barnakonu, so er tíðin komin hjá henni at eiga. Soleiðis er eisini her, vit ganga móti endanum. Tíðin er komin, at Jesus fer at opinberast, sum skrivað stendur. Heimurin, serliga vesturheimurin er við at fylla syndamálið. Í samband við verkirnar so talar tað, sum hendir í miðeystri ómetaliga sterkt til okkara eisini. Tað er tí umráðandi hjá tí vantrúgvandi at venda sær til Jesus Kristus og fáa syndirnar fyrigivnar, áðrenn tað verður ovseint. Tann trúgvandi eigur at vakna upp úr svøvni og gera seg til reiðar at møta frelsara sínum.

Hetta at mørkini falla hevur vissuliga við óndskaparans andaherð í himmalrúminum at gera. Antikristus verður kallaður hin lógleysi, 2. Tessalonikabræv 2,8 - hann skal standa fram á seinastu døgum, og hann er sendisveinur Djevulsins. Álvarsamt.

Tá ið Jesus var upprisin frá deyðum, sendi hann ápostlarnar út at prædika umvending og syndafyrigeving fyri øllum fólkasløgum. Lít ikki á at ein og hvør er sáligur í sínari trúgv. Men ver vísur í, at tú ert føddur av nýgggjum, og at tað sum tú hvílir á, er fullgjørda verk Guds í Jesus Kristusi.

# Til Postver Føroya - Hugsi tykkum um!

JÓNA MORTENSEN



24.05.2009 ringdi Postverk Føroya til foreldur míni fyri at siga, at um tey framyvir vildu hava post, máttu tey heinta hann á Posthúsinum á Óðinshædd, og at onkur brøv longu vóru farin retur - harímillum telefonrokningin. Mamma mín, sum er 81 ár, skilti einki, ringdi ólukkulig til mín og visti ikki hvat og hvussu. Hon hevði skilt tað sum um húsanummarið skuldi standa á garðinum, men skilti annars ikki, hvat daman á posthúsinum meinti við.

Eg ringi til posthúsið fyri at kanna, hvat alt hetta snúði seg um, -veit at tað kann ikki vera tað, at postkassin er ov langt burtur frá vegnum. Eg tosi við eina ógvuliga fryntliga damu, sum greiðir mær frá, at tey eru farin at "stramma upp" og vilja hava øll at seta nøvn á postkassan. Er tað ikki óluksáliga fýrakantað- at senda brøv retur? Hvat við at postboðið hevði ein navnaseðil við til hesi eldru fólkini, ístaðin fyri at senda postin retur. Eg meini so við - foreldur míni havt henda bústaðin síðani 1962 og eru bæði yvir 80 ár.

Í hugaheiminum hjá teim eldru kann hetta fylla og oyðileggja fleiri dagar - tey hava livað í eina aðrari tíð og skilja ikki altíð alt hett nýggja. Um eg ikki hevði ringt og kannað málið, so hevði telefonin ivaleyst eisini verið slitin. Soleiðis kann man ikki fara við eldri fólki - hvar eru 'innlivingarevnini', sunn fornuft, medmenniskjaligheit og líknandi hjá ábyrgdarhavandi á posthúsinum?

Løgið at slíkt kann koma fyri ....